J. nr.: 21/24072

# Reglugerð

# fyri

# at veita stuðulsjáttan til føroysk seyðaskinn

## Endamál

**§ 1.** Endamálið er at tryggja, at føroysk seyðaskinn koma til høldar.

## Stuðulstreytir

**§ 2.** Stuðul kann latast einstaklingum, virkjum og feløgum, sum eru bókhaldsskyldug og mvg-skrásett.
*Stk.2.* Stuðul verður latin til djóralæknakanningar í sambandi við, at skinn skulu flytast av landinum at garva.
*Stk. 3.* Stuðul verður latin til flutning í sambandi við, at skinn skulu garvast.

## Umsókn

**§ 3.** Búnaðarstovan umsitur stuðulsjáttanina.
*Stk. 2.* Umsóknir skulu skrivast á oyðublaðið *Umsóknarblað til stuðul av játtanini til føroysk seyðaskinn*, sum er tøkt á heimasíðuni hjá Búnaðarstovuni: *www.bst.fo*. Oyðublaðið fæst eisini frá Búnaðarstovuni.
*Stk. 3.* Umsóknarfreistin er 15. desember í verandi játtanarári.

## Játtan

**§ 4.** Stuðul verður latin, um játtan er tøk á kontu 6.33.2.15 á fíggjarlógini.
*Stk. 2.* Stuðul verður játtaður umsøkjarum í lutfalli til samlaða talið av skinnum, ið søkt verður um stuðul til.

## Útgjald av stuðli

**§ 5.** Roknskapur fyri veittan stuðul skal vera latin Búnaðarstovuni áðrenn 1. februar árið eftir stuðulsveitingina.
*Stk. 2.* Stuðulin verður útgoldin, tá Búnaðarstovan hevur fingið roknskap, sbr. § 6, fyri hildnar útreiðslur, ið eru farnar til endamálið.

**Roknskapur og grannskoðan**

**§ 6**. Roknskapur fyri stuðulsárið skal lúka treytirnar í § 21 ella § 22 í kunngerð nr. 125 frá 19. september 2011 um lógarbundna játtan og stuðulsjáttan.

*Stk. 2*. Grannskoðaður roknskapur fyri veittan stuðul skal vera latin Búnaðarstovuni fyri 1. februar árið eftir stuðulsveitingina, sbr. tó stk. 3.

*Stk. 3*. Er stuðulin minni enn 500.000 kr., kann í staðin verða latin váttan um víðkaða gjøgnumgongd, sbrt. §§ 9-11 í kunngerð um grannskoðanarváttanir o.a. Er stuðulin minni enn 100.000 kr., verður ikki kravd váttan frá góðkendum grannskoðara.

**Gildiskoma**

**§ 7.** Hesar reglur koma í gildi beinanvegin.

Umhvørvis- og vinnumálaráðið, tann 1. desember 2021

**Magnus Rasmussen**
landsstýrismaður

/Herálvur Joensen
aðalstjóri